# l ímóti Norrönu



Norröna við bryggju í Scrabster – á síni fyrstu almennu ferð úr Føroyum. Ein søguligur dagur



Á myndini sæst, at rampin á Norröna er ov stórur til ferjuleguna, men skotar hava gjørt eina landgongd, sum eisini sæst á myndini. Hendan landgongdin verður sett inn á rampan á Norrønu

Andrass Róin, nevndarformaður í Smyril Line, tosaði vegna felagið við móttøkuna. Hann helt fyri, at hóast skotar í fótbólti vunnu á okkum, vilja vit kortini samarbeiða. Men so legði hann eisini aftrat, at tá Føroyar næstu ferð fara at vinna á skotum, fara vit eisini at vilja samarbeiða.

Jú, stemningurin var lættur, og í práti nevndi Jamie Stone, sum er politiskt umboð í hesum parti av Skotlandi, at hann hevði arbeitt í Føroyum og kendi føroyingar. Jamie spurdi eitt nú eftir Egili Toftegaard, sum í sínari tíð var stjóri á Handils-og Frystivirkinum í Fuglafirði.

Við móttøkuna vóru skotar mannaðir við eitt nú havnameistaranum í Scrabster, William Calder og Anne Dunnett, lordi í økinum.

Í stuttum práti við Sosialin vísti Sofus Poulsen á, at Ísland er besta "agnið", sum hann tók til, hjá Norrønu vestanfyri. Landið er víðakent fyri síni sermerki, ikki minst heitu keldurnar, glesjarnar og søguligu støðini.

Gávur vórðu handaðar, og Andrass Róin fekk, sum umboð fyri Smyril Line, eina steinplátu við áskrift um hendan søguliga dag, nú Norröna er farin at sigla til Scrabster.

Móttøkan prógvaði, at skotar eru sera fegnir um, at Smyril Line hevur valt Scrabster sum havn í summarferðaætlanini – og semja var um, at hesin dagurin, nú nýggja Norröna fyrstu ferð legði til bryggju í Scrabster, er søguligur.

## Væleydnað ferð

Komin umborð aftur, loysti Norröna og helt leiðina fram til Bergens, har vit komu í fagrasta summarveðri út á seinnapartin týsdagin.

Mikudagin um 15-tíðina legði Norröna aftur til bryggju í Havn eftir eina sera væleydnaða "jomfrúferð" í Skotlandi.

Leiðsla og starvsfólk á Smyril Line, sum við vóru í ferðalagnum, gjørdu hesa rundferð ógloymandi.



Andrass Róin, nevndarformaður í Smyril Line, hevur fingið steinplátu um søguligu hendingina. Kvinnan er Anne Dunnett, lordur



Føroyska ferðalagið er nú á Weigh Inn hotellinum til móttøku – og í túninum bíða tvær limousinur og minibussar